# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum,
at kæra kona, mamma, vermamma, omma
og langomma okkara

**Mathea Olsen**
**fødd Højgaard**
**Toftir**

andaðist í heiminum 23. mai, 71 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Fríðrikskirkjuni
mikudagin 26. mai kl. 14.00.

*Vegna tey avvarðandi*

**Hjalmar, Eskilda, Sámal Petur**
**og Vónbjørt v/ familjum**

Tey, ið vilja minnast Matheu, kunnu lata Fríðrikskirkjuni eina gávu. Konto í peningastovnunum.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at okkara
kæri maður og pápi

**Kim F. Jacobsen**
**Klaksvík**

andaðist fríggjadagin 21. mai, 42 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Betesda
mikudagin 26. mai kl. 13.30.

*Familjunnar vegna*

**Gunnleyg, Rói, Bergur, Kristina og Teitur**

## Dagurin

**25. mai. Urbanus.** Hann var Pávi, til hann varð hálshøgdur ár 230. Eftir teimum gomlu álmannakkunum var Urbanus fyrsti summardagur. Navnið merkir upprunaliga *býarbúgvi*.


*Móttøka*

*Í samband við, at Heilsuhjálparafelag Føroya verður 25 ár mikudagin tann 26. mai, verður opið hús í hølum felagsins Fr. Petersensgøta 7 Tórshavn henda sama dagin frá kl. 14.00 til kl. 19.00 fyri áhugaðum og limum.*

*Nevndin*

Heilsuhjálparafelag Føroya · Fr. Petersensgøta 7
FO- 100 Tórshavn · Tel 31 77 25 · Fax 31 91 17
Teldupost: heimahj@post.olivant.fo


Landssjúkrahúsið, Sjúkraflutningstænastan:

# Marner og Sunnleif 25 ára starvsdag



*Sunnleif Kjærbæk og Marner við Skipá á Sjúkraflutningstænastuni kundu seinasta fríggjadag halda sín 25 ára starvsdag á Landssjúkrahúsnum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Fríggjadagin 21. mai 2004 høvdu Marner við Skipá og Sunnleif Kjærbæk, portørar á Landssjúkrahúsinum, 25 ára starvsdag**

Marner við Skipá er 51 ára gamal. Hann er ættaður úr Sørvági og hevur búð í Havn síðan 1962. Hann lærdi til bilmekanikara hjá Auto Service (í dag P/f Meinhardt Arge) frá 1969-73. Eftir útbúgvingina arbeiddi hann hjá Reyni Service í Rættará í tvey ár. Seinni arbeiddi hann sum bilmekanikari og á dekkverkstaðnum hjá Auto Service, til hann byrjaði á Landssjúkrahúsinum 21 mai. 1979 sum portørur.

Sunnleif Kjærbæk er 57 ára gamal og ættaður úr Sumba. Hann flutti til Havnar í 1962 og hevur búð á Hvítanesi síðan 1981. Frá 1962-65 arbeiddi hann á Bacalao, og frá 1965-70 var hann í byggivinnuni og arbeiddi hjá byggimeistarunum Herluf Johansen og Ásmundi Poulsen. Frá 1970–77 arbeiddi hann á Tórshavnar Skipasmiðju, har hann eisini lærdi til sveisara. Eftir tað arbeiddi hann sum rørleggjari hjá Henry Poulsen, til hann 21. mai 1979 fekk starv sum portørur á Landssjúkrahúsinum.

Tá Marner og Sunnleif byrjaðu sum portørar, vóru bert tveir sjúkrabilar á Landssjúkrahúsinum í mun til í dag, tá teir eru seks í tali, har tríggir eru í Havn og hinir í Eysturoy Vágum og Sandoy. Umframt hesar eru eisini eykabilar, og í løtuni eru tveir nýggir sjúkrabilar í gerð.

Í 1979 vóru teir 12 portørar. Í dag eru umleið 30 starvsfólk á Sjúkraflutningstænastuni - sum tað eitur í dag, tá eru Sandoy og Eysturoy við.

Á Sjúkraflutningstænastuni fáa teir javnan undirvísing og verða dagførdir innan sjúkraviðgerð og at handfara skaðar.

Báðir hava teir trivist væl á Landssjúkrahúsinum.

# Almennur fyrilestur á Fróðskaparsetrinum

**Áttandi og seinasti fyrilesturin í røðini 'Modernaðir teoretikarar' sum Fróðskaparsetur Føroya og Føroya Fróðskaparfelag hava skipað fyri í vár, verður týskvøldið 26. mai kl. 20.00 í Ovastovu í Nóatúni**

FYRILESTUR
*Tíðindaskriv*

Jonathan Schwartz, Ph.d. í mannfrøði (antropologi) fer at halda fyrilesturin »Max Weber kallar á teg! - Hví protestantiska siðalæran og sál kapitalismunnar (1904-5) eru klassikarar«.

Hugsanin um kallið (týska orðið »Beruf« fyri arbeiði umfatar henda tanka) er hjartastrongurin í teorini hjá Max Weber. Hann er kendur fyri at hava lýst upprunan hjá modernaðu, vesturlendsku kapitalismuni. Høvuðsendamálið við sosiologiska arbeiðslagi hansara var at avdúka sínámillum samanhangir millum ymiskar sosialar mekanismur. Í hesum føri virki hjá modernaðu kapitalismuni. Weber kannaði læruna og praktikkarnar hjá kristnu kirkjuni, tá ið protestantiska siðaskifti fór fram. Kalvinistiska »kallið« til disiplinerað/agafult arbeiði og asketiskar vanar gjørdust fyri Weber tað sum kveikti og fekk ferð á modernaða kapitalismuna. Hugtakið »kall« hjá Weber fær fram sambandið millum átrúnað og búskap í modernaðum tíðum.

Jonathan Schwartz, Ph.D, er nýligani farin frá sum lektari á Institut for Antropologi á lærda háskúlanum í Keypmannahavn. Hann er úr Seattle í USA, men hevur búð í Danmark síðan 1970. Hann hevur skrivað fleiri bøkur og er sera virkin í samfelagskjakinum í Danmark. Gransking hansara hevur serliga viðgjørt evni sum: innflytarar og flóttafólk í Norðurlondum, Makedonia, Bosnia, antropologisk ástøði og amerikanska antropologi.

Fyrilesturin verður á enskum.

Hinir 7 fyrilestrarnir í røðini vóru hesir: Turið Sigurðardóttir: »Vitan og vald - mentanarkritikkur Edward Saids«, Guðrun Gaard: »Í tøgnini ert tú - Um dialogspeki í bókmentafrøðini.«, Malan Marnersdóttir: »Tú skrivar sum tú lesur - um millumtekstleika.«, Firouz Gaini: »Ernest Gellner. Størsti forsprákarin fyri rationalismuni í nýggjari tíð.« Erika Hayfield: »Børn og forbrúk« Hans Andrias Sølvará: »Vald, vitan og framburður í verkinum hjá Michel Foucault«, Bergur Hansen: »Ein stormur í hvørjari mynd - Myta og modernaður tilvísingartrupulleiki í symbol- og metaforhermeneutikkinum hjá Paul Ricoeur«



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

**Minningarorð um mín góða vin**

## Ragnar Johansen

**4. oktober 1936 9. mai 2004**



Góði Ragnar, tað kom dátt við at hoyra, at tú so brádliga ikki er ímillum okkum meira.

Vit báðir hava kent hvønn annan næstan heila lívið, eisini hava vit búð saman eina tíð á Lærlingaheiminum Nørre Søgade 11 í Keypmannahavn, tað var fyrst í fimmtiárunum.

Fyrst fór tú í læru sum maskinsmiður, eina tíð eftir fór tú á læraraskúlan í Havn, so var tú lærari við Vágs skúla, frá 1. august 1966 til 1. august 1968, so aftur til Danmarkar til »Madeskovskolen« í Nakskov frá 1. august 1968 til tú fór frá við pensión 1. desember 2003.

Í 1974 bleiv tú valdur í »Nakskov býráð« 1. apríl 1999 hevði tú 25 árs jubileum. Tú mást vera einasta føroyingur sum hevur við býráðslimur í samfull 27 til 28 ár uttanlands.

Tær at takka blivu Nakskov og Vágur vinarbýir.

Tú hevur eisini gjørt eitt stórarbeiði fyri »Vágs Bóltfelag« sum fleiri ferðir hevur verið í Nakskov á venjingarlegu, eisini at Vágur á jólum hevur flott jólatræ við minnisvarðan.

Góði Ragnar, eisini vil eg takka tær hjartaliga fyri stórarbeiði tú hevur havt av at samla okkum úr stóra skúlaflokkinum, sum fóru í fyrsta klassa 1943/44, tað var ikki bara sum at siga tað, vit vóru ikki minni enn 90 næmingar, 43 og 47 í hvørjum flokki, nógv farin víða um knøttin, eisini hettar eydnaðist sera væl, bæði í 1986, 1996, 2000 og 2002, vit tosaðu um at endurtaka hett fyri síðstu ferð í 2006, livst so spyrst.

Minnist sera væl, tá ið tú vart biðin um at halda midnáttarrøðuna á jóansøku í 2000, tú mátti byrja við »Hvar enn tín fótur fjakkar hvar enn tú festur búgv« hann hava vit báðir sungið manga ferðir saman, somuleiðis »Vágs bygd« »Heimbygd mín« og »Rysjudalur« o.s.v. tú hevði stóran tokka til Vágs bygd. Vágbingur vart tú við húð og hár.

Góða Elsa, Anna Elisabeth, Rakul, Ark og Finnur, má Harrin styrkja tykkum í sakninum og sorgini. Friður veri við minninum um Ragnar hjá Sámal Johansen.

**Svend Olsen**
**Hvidovre**

# Børnini sýna fram á Torginum

**Hesa vikuna verða listaverk hjá børnum í verkætlanini »Havnin – ein býur, har børnini trívast« sýnd fram á Torginum í SMS**

FRAMSÝNING



Í sambandi við stóru verkætlanina »Havnin – ein býur, har børnini trívast«, sum er farin fram síðani 26. apríl, er stór listaframsýning á Torginum í SMS hesa vikuna.

Arbeiðsheitið fyri verkætlanini og tí eisini listaframsýningini er »hagin og várið«. Málsetningurin við verkætlanini er, at øll 6-7 ára gomul børn í býnum skulu fáa eina stóra felags uppliving við støði í okkara dýrabæru náttúru umframt at sleppa at royna síni skapandi evni á verkstøðum í Havn. Endamálið er at stimbra skapanargleðina hjá børnum, at byggja brýr millum ymsar fatanir og at fáa positivar ringar at breiða seg, at geva børnunum eina kenslu av, at tey eru ein virðismikil partur av fólkinum og ein sjónligur partur av býnum. Við framsýniningin í SMS kann bert staðfestast, at hetta er hepnast væl, tí framsýningin hjá ungu listafólkunum er áhugaverd.

Á framsýningini verða sýndar fram ymiskar listagreinar, nevnliga grafikkur, máling og tekning og leirlist. Oggi Lamhauge hevur undirvíst børnunum í grafikki. Børnini hava arbeitt við tveimum greinum, nevnliga radering og kallasjuprint. Á framsýningini er ein mynd frá hvørjum av teimum 80 børnunum, sum higatil hava verið á grafiska verkstaðnum.

Eli Smith hevur undirvíst børnunum í máling og tekning. Her hava børninin gjørt litblýants- og blýantstekningar og onkrir akryl málningar eru ímillum verkini.

Guðrið Poulsen hevur undirvíst børnunum í skultpturi og flatmyndum úr leiri, og hevur hugflogið eisini her verið sera gott hjá børnunum.

Oggi Lamhauge, sum hevur undirvíst børnunum í myndlist, sigur, at børnini við forvitnisligu framsýningini í SMS, geva sínum innaru »inntrykkum« eitt »útrykk«.

– Framsýningin er øðrvísi og útrykksfull, har børnini vísa sínar innaru tankar, sigur hann.

Oggi vísir somuleiðis á, at framsýningin er stór og umboðar ein heilan árgang av børnum í Tórshavnar Kommunu, og at man eigur at vitja hesa serligu framsýning, sum er á Torginum í SMS til og við fríggjadagin 28. mei. Tær myndir sum ikki eru liðnar enn, verða sýndar fram í Mentamálaráðnum, sum heldur til við Hoyvíksvegin, frá hósdegnum 3. juni.

Tey, sum hava stuðlað tiltakinum eru: Mentamálaráðið, Mentanardeildin hjá Tórshavnar kommunu, Kvøldskúlaskipanin, Føroya Sparikassi, Føroya Pedagogfelag, Starvsmannafelagið, Kunningarstovan í Havn og SMS.

**Minningarorð um systkinabarn mítt**

## Leon Gunnar Johannesen

**14. november 1988 22. mars 2004**



Góði, elskaði Leon Gunnar, tú bleiv tikin frá okkum so tíðliga og brádliga. Og eftir sita vit og spyrja hví?! Men líka so vist, at okur verða borin inn í henda heim, ja, líka so vist er tað, at okur ein dag aftur skulu úr hesum heimi.

Leon Gunnar, altíð var tú glaður, smílandi drongur, og altíð klárur at hjálpa. Tú var nógv avhildin og saknurin er stórur, nú tú ikki er millum okkum longur. Tað er so tómligt her á Sevmýri, altíð hoyrdi eg teg koyra framvið á knallert, ella sá teg ganga og altíð heilsaði tú. Ja, og ikki at gloyma jólini úti hjá ommuni og abbanum. Vit bæði fóru tíðliga út at hjálpa ommuni at gera klárt, pynta, leggja pakkar undir træið og seta matin á borðið. Tað var so hugnaligt. Men í ár stendur tín sessur tómur. Tað verður ongantíð tað sama aftur uttan eg, góði.

Eg hevði ikki havt koyrikortið leingi, fyrrenn tú kom biltúr við mær, og altíð høvdu vit tað stuttligt og flentu saman. Tú var biltúr við mær fáar dagar áðrenn tú bleiv tikin frá okkum, og tað eri eg glað fyri, tí so fingu vit prátað og stuttleikað okkum eina síðstu ferð.

Tú var ikki meira enn 15 ára gamal, ja í besta aldri, sum orðatakið sigur, »eingin veit á morgni at siga, hvar ein á kvøldi gistir«. Tað er satt, eingin veit hvat dagurin hevur at bjóða okkum, tí skulu vit ikki taka lívið fyri givið.

Eg var í skúla, tá eg fekk at vita, hvat var áfatt, og eg trúði tí ikki. Tað gekk ikki upp fyri mær tá, og eg haldi ikki at tað er tað enn. Tað er so ófatiligt tað heila og tómligt uttan teg, Leon Gunnar góði! Tú kendi so nógv fólk og tosaði við øll. Saknurin er stórur og tað sá man eisini við jarðarferð tína, kirkjan var full av fólki, sum vóru komin at fylgja tær á síðstu ferð tíni.

Góði Leon Gunnar, hvíl í friði kæri skattur, og Jesus pápin veri hjá tær til okur einaferð møtast aftur.

Má Gud styrkja og verja mostur, Teddy gubban, Angilie, Jan og Erolf.

*Dagsarbeiðið hjá Leon Gunnar endað er,*
*sum hann, ver trúgvur alla tína ferð;*
*hans unga likam kundi hvílu fá.*
*Gud stilla kann hvørt hjartans djúpa trá.*

*Til síðsta farvæl og hvíl í friði her,*
*títt sakn er stórt ímillum tíni her;*
*Gud troysti tann títt hjarta hevði kær,*
*Hann eina veit hvat okkum gagnligt er.*

**Elin**